# Semja millum
# øðrumegin
# Føroya Handverkarafelag og Landsfelag Handverkaranna
# og hinumegin
# Fíggjarmálaráðið

**Sáttmálaskeið og løn**
Sáttmálin verður endurnýggjaður fyri tíðina frá 1. oktober í 2015 til 1. oktober í 2017.

Semjan byggir á ein karm, sum er 2,25% fyrra árið og 1,9% seinna árið.

Lønartalvan verður longd til at hava 25 stig.

Handverkarar ganga stigini 1 til 13 frá 1. oktober 2015 at rokna.

Í § 3, stk. 5 verður 6 broytt til 5 (konsekvensbroyting).

Lønirnar hækka 1,584% tann 1. oktober 2015 og 1,9% tann 1. oktober 2016.

**§ 7a, stk. 1 verður soljóðandi: Vaktarskylda**
Henda grein er um eitt nú húsavørðar. Tá ið handverkari verður settur í starv, sum fevnir um ávísa vaktarskyldu ella ávísa telefonvakt og ber í sær aðrar vansar, skal avtala verða gjørd um, hvørja samsýning, handverkarin skal hava. Samsýningin kann vera veitt sum løn ella sum avspákan. Tá ið mett verður um samsýningina, verður tikið við alt tað, sum hevur týdning, so sum, hvat verður kravt av handverkaranum, hvussu ofta nakað kemur fyri, og tradisjónirnar í fakinum.
Hevur ein handverkari skyldu at ansa flagginum, verður virðið av tí sett at vera 1.000 kr. eyka um mánaðin, goldið sum eyka samsýning ella sum avspákan. Eru fløggini 4 ella fleiri, er samsýningin 1.500 kr. eyka um mánaðin, goldið sum eyka samsýning ella sum avspákan.
Avtalur um viðbøtur verða at senda Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum til góðkenningar.

**§ 8 um eftirlønargjald verður soljóðandi:**
Arbeiðsgevarin rindar eftirlønargjald av grundlønini eftir lønartalvu galdandi fyri henda sáttmála í góðkenda eftirlønarskipan sambært eftirlønarlógini.

**§ 15 stk. 3 verður strikað.**

**§ 18 um barnferð verður soljóðandi:**
Handverkari, ið er við barn, eigur at siga stovninum frá í minsta lagi 3 mánaðir, áðrenn hon væntar at eiga.
Handverkari, ið vegna viðgongu og barnsburð er burtur frá arbeiði, hevur rætt til barsilsfarloyvi við løn í 24 vikur tilsamans, at rokna frá í fyrsta lagi 8 vikur undan væntaðum barnsburði.
Frá 14. viku eftir barnsburð kunnu foreldrini býta rættin til barsilsfarloyvi við løn ímillum sín.

**§ 21. Frí við ongari løn**
Tá ið handverkari fær tænastufrí við ongari løn, verður gjørdur lønarfrádráttur.
a) Tá ið handverkari er burtur heilar mánaðir, verða drignar heilar mánaðarlønir.
b) Tá ið handverkari er burtur vikur, dagar ella tímar, verður drigið fyri teir tímar, hann undir vanligum umstøðum hevði verið til arbeiðis hetta tíðarskeiðið. Ein tími verður roknaður sum árslønin býtt við 2080 (40*52). Við í árslønina verða roknað øll gjøld, sum verða goldin sum føst mánaðargjøld.

**§ 22. Seravtalur**
Í sáttmálatíðini skal vera møguligt at gera seravtalur millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna.

**§ 23. Gerðarrættur**
Ivaspurningar um at tulka sáttmálan verða at leggja fyri Fasta Gerðarrætt.

**§ 24. Gildi sáttmálans**
Hesin sáttmáli er galdandi frá 1. oktober í 2015, og báðir partar kunnu siga hann upp við 3 mánaða freist, tó í fyrsta lagi til 1. oktober í 2017.

*Á Argjum tann 16. desember í 2015*

Føroya Handverkarafelag

Fíggjarmálaráðið

Landsfelag Handverkaranna

## Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna

### Lønartalva galdandi frá 1. oktober 2016

| lønarstig | mánaðar-løn netto | eftirlønar-gjald 15% | tímaløn | yvirtíð 1 | yvirtíð 2 |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 22.191,72 | 3.328,76 | 128,03 | 192,05 | 256,06 |
| 2 | 22.454,91 | 3.368,24 | 129,55 | 194,33 | 259,10 |
| 3 | 22.718,10 | 3.407,72 | 131,07 | 196,61 | 262,14 |
| 4 | 22.981,28 | 3.447,19 | 132,58 | 198,87 | 265,16 |
| 5 | 23.244,46 | 3.486,67 | 134,10 | 201,15 | 268,20 |
| 6 | 23.507,65 | 3.526,15 | 135,62 | 203,43 | 271,24 |
| 7 | 23.770,83 | 3.565,62 | 137,14 | 205,71 | 274,28 |
| 8 | 24.034,01 | 3.605,10 | 138,66 | 207,99 | 277,32 |
| 9 | 24.297,20 | 3.644,58 | 140,18 | 210,27 | 280,36 |
| 10 | 24.560,39 | 3.684,06 | 141,69 | 212,54 | 283,38 |
| 11 | 24.823,57 | 3.723,54 | 143,21 | 214,82 | 286,42 |
| 12 | 25.086,75 | 3.763,01 | 144,73 | 217,10 | 289,46 |
| 13 | 25.349,94 | 3.802,49 | 146,25 | 219,38 | 292,50 |
| 14 | 25.613,13 | 3.841,97 | 147,77 | 221,66 | 295,54 |
| 15 | 25.876,31 | 3.881,45 | 149,29 | 223,94 | 298,58 |
| 16 | 26.139,49 | 3.920,92 | 150,80 | 226,20 | 301,60 |
| 17 | 26.402,68 | 3.960,40 | 152,32 | 228,48 | 304,64 |
| 18 | 26.665,86 | 3.999,88 | 153,84 | 230,76 | 307,68 |
| 19 | 26.929,05 | 4.039,36 | 155,36 | 233,04 | 310,72 |
| 20 | 27.192,23 | 4.078,83 | 156,88 | 235,32 | 313,76 |
| 21 | 27.455,42 | 4.118,31 | 158,40 | 237,60 | 316,80 |
| 22 | 27.718,60 | 4.157,79 | 159,92 | 239,88 | 319,84 |
| 23 | 27.981,78 | 4.197,27 | 161,43 | 242,15 | 322,86 |
| 24 | 28.244,97 | 4.236,75 | 162,95 | 244,43 | 325,90 |
| 25 | 28.508,16 | 4.276,22 | 164,47 | 246,71 | 328,94 |

Handverkarar ganga stigini 1 til 13
Leiðandi handverkari er á stigi 18
Formenn hjá Landsverki eru á stigi 23

| | |
|---|---|
| Vaktargjald 1 | 23,16 |
| Vaktargjald 2 | 46,32 |

## Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna

### Lønartalva galdandi frá 1. oktober 2015

| lønarstig | mánaðar-løn netto | eftirlønar-gjald 15% | tímaløn | yvirtíð 1 | yvirtíð 2 |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 21.777,94 | 3.266,69 | 125,64 | 188,46 | 251,28 |
| 2 | 22.036,22 | 3.305,43 | 127,13 | 190,70 | 254,26 |
| 3 | 22.294,50 | 3.344,18 | 128,62 | 192,93 | 257,24 |
| 4 | 22.552,78 | 3.382,92 | 130,11 | 195,17 | 260,22 |
| 5 | 22.811,05 | 3.421,66 | 131,60 | 197,40 | 263,20 |
| 6 | 23.069,33 | 3.460,40 | 133,09 | 199,64 | 266,18 |
| 7 | 23.327,61 | 3.499,14 | 134,58 | 201,87 | 269,16 |
| 8 | 23.585,88 | 3.537,88 | 136,07 | 204,11 | 272,14 |
| 9 | 23.844,16 | 3.576,62 | 137,56 | 206,34 | 275,12 |
| 10 | 24.102,44 | 3.615,37 | 139,05 | 208,58 | 278,10 |
| 11 | 24.360,72 | 3.654,11 | 140,54 | 210,81 | 281,08 |
| 12 | 24.618,99 | 3.692,85 | 142,03 | 213,05 | 284,06 |
| 13 | 24.877,27 | 3.731,59 | 143,52 | 215,28 | 287,04 |
| 14 | 25.135,55 | 3.770,33 | 145,01 | 217,52 | 290,02 |
| 15 | 25.393,83 | 3.809,07 | 146,50 | 219,75 | 293,00 |
| 16 | 25.652,10 | 3.847,82 | 147,99 | 221,99 | 295,98 |
| 17 | 25.910,38 | 3.886,56 | 149,48 | 224,22 | 298,96 |
| 18 | 26.168,66 | 3.925,30 | 150,97 | 226,46 | 301,94 |
| 19 | 26.426,94 | 3.964,04 | 152,46 | 228,69 | 304,92 |
| 20 | 26.685,21 | 4.002,78 | 153,95 | 230,93 | 307,90 |
| 21 | 26.943,49 | 4.041,52 | 155,44 | 233,16 | 310,88 |
| 22 | 27.201,77 | 4.080,27 | 156,93 | 235,40 | 313,86 |
| 23 | 27.460,04 | 4.119,01 | 158,42 | 237,63 | 316,84 |
| 24 | 27.718,32 | 4.157,75 | 159,91 | 239,87 | 319,82 |
| 25 | 27.976,60 | 4.196,49 | 161,40 | 242,10 | 322,80 |

Handverkarar ganga stigini 1 til 13
Leiðandi handverkari er á stigi 18
Formenn hjá Landsverki eru á stigi 23

| | |
|---|---|
| Vaktargjald 1 | 22,72 |
| Vaktargjald 2 | 45,44 |

# Sáttmáli

millum

## Føroya Handverkarafelag/ Landsfelag Handverkaranna

og

## Fíggjarmálaráðið

2015

**Innihaldsyvirlit**

§ 1. Sáttmálaøki ..... 3
§ 2. Setanarbræv ..... 3
§ 3. Løn ..... 3
§ 4. Starvsaldur ..... 3
§ 5. Viðbøtur ..... 3
§ 6. Yvirtíðarløn ..... 4
§ 7. Arbeiði forskotna tíð ..... 4
§ 7 a. Vaktarskylda ..... 4
§ 8. Eftirlønargjald ..... 5
§ 9. Fyribils tænasta í hægri starvi ..... 5
§ 10. Avspákan ..... 5
§ 11. Tænastuferðir ..... 5
§ 12. Ferðing í arbeiðsørindum ..... 5
§ 13. Flytisamsýning ..... 5
§ 14. Arbeiðsklæði ..... 5
§ 15. Fastir frídagar ..... 5
§ 16. Frítíðarreglur ..... 5
§ 17. Farloyvi v.m. ..... 5
§ 18. Barnferð ..... 6
§ 19. Reglur fyri uppsøgn, sjúkraløn v.m. ..... 6
§ 20. Álitisfólk ..... 6
§ 21. Frí við ongari løn ..... 7
§ 22. Seravtalur ..... 7
§ 23. Gerðarrættur ..... 7
§ 24. Gildi sáttmálans ..... 7

**§ 1. Sáttmálaøki**
Hesin sáttmáli fevnir um fastløntar handverkarar, húsavørðar, skúlatænarar og umsjónarmenn (í tí fylgjandi nevndir handverkarar), sum starvast á stovnum, har Fíggjarmálaráðið hevur málsræði til at áseta lønar- og setanarviðurskiftini.
*Stk. 2.* Tá ið starv er leyst, verður tað alment lýst leyst at søkja.

**§ 2. Setanarbræv**
Mánaðarlønt og tey, sum eru sett í tíðaravmarkað starv út yvir 3 mánaðir, fáa í seinasta lagi 14 dagar eftir setan setanarbræv, og í tí skal standa:

- navn og bústaður hjá setanarmyndugleikanum og tí setta
- nær setanin tekur við
- galdandi sáttmáli millum omanfyri nevndu partar at ganga eftir
- starvsheiti
- byrjanarløn (grundløn umframt fastar viðbøtur og/ella ískoyti)
- eftirlønargjald
- starvsaldur og næstu broytingar í starvsaldri
- uppsagnartíð frá arbeiðsgevara og setta
- setanarbrotpartur, arbeiðstíð
- frítíð við løn og frítíðarískoyti
- setanarøki og arbeiðsstaður/staðir í løtuni (fatar arbeiðið um fleiri støð, skal verða viðmerkt, hvar tann setti hevur høvuðsstarv).

**§ 3. Løn**
Handverkarar verða løntir eftir lønartalvum galdandi fyri henda sáttmála.
*Stk. 2.* Tann í stk. 1 ásetta løn er treytað av fullum dagsarbeiði, sum vanliga telur 39,5 tímar um vikuna íroknað ½ tíma mattíð um dagin. Arbeiðstíðin eigur, har tað letur seg gera, at verða løgd soleiðis, at leygardagur verður frídagur.
*Stk. 3.* Fyri handverkarar við niðursettari arbeiðstíð verður lønin roknað lutfalsliga eftir tímatalinum.
*Stk. 4.* Fyri lakkeringsarbeiði verður roknað 1½ tíma eyka um tíman.
*Stk. 5.* Handverkari, sum er leiðari hjá øðrum handverkarum, verður løntur við einari løn, sum svarar til 5 eyka lønarstig í lønartalvuni, sí hesa.

**§ 4. Starvsaldur**
Lønaraldurin verður roknaður frá tí, viðkomandi hevur fingið lærubræv/sveinabræv, um so er, at viðkomandi síðani lokna læru hevur arbeitt innan handverkarayrkið. Lønaraldur verður rundaður uppeftir til heilan mánað.
*Stk. 2.* Er talan um arbeiðstíð minni enn hálva tíð verður lønaraldurin roknaður lutfalsliga. Aðrar arbeiðstíðir roknast at geva fullan lønaraldur.
*Stk. 3.* Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna og Fíggjarmálaráðið kunnu koma ásamt um hægri lønaraldur enn tann í stk. 1 umrødda, tá ið serligar umstøður gera seg galdandi.

**§ 5. Viðbøtur**
Um so er, at starvið arbeiðsliga, frøðiliga, umsitingarliga, fyrisitingarliga, ábyrgdarliga ella á annan hátt hevur eina tílíka serstøðu, at tað ikki er umfatað av teimum vanligu fortreytunum fyri ásettu lønunum o.a., verður seravtala gjørd millum Fíggjarmálaráðið og felagið um viðbøtur og onnur viðurskifti. Um so er, at starvsviðurskiftini, sum eitt nú sjálvstøðugt arbeiði ella ábyrgd av fólki í vardum starvi, tala fyri, kann verða veitt handverkara ein viðbót afturat tí í § 3 nevndu løn.

Viðbøtur og møguligar aðrar sømdir verða veittar eftir avtalu ímillum Føroya Handverkarafelag/ Landsfelag Handverkaranna og Fíggjarmálaráðið.
*Stk. 2.* Handverkari, sum leggur lík í kistu, fær í samsýning roknaðar 3 vanligar tímar eyka.

**§ 6. Yvirtíðarløn**
Yvirtíðararbeiði eigur helst ikki at vera.
*Stk. 2.* Fyri álagt yvirtíðararbeiði verður goldin yvirtíðarløn afturat vanligu dagligu tímalønini soleiðis: Fyri 1., 2. og 3. tíman verður goldið 50%. Fyri 4. og fylgjandi yvirtímar og fyri arbeiði leygardagar, sunnudagar og fyri teir í § 15 nevndu frídagar 100%.
Yvirtíðargjald verður latið fyri hvønn ½ byrjaða tíma.
*Stk. 3.* Um tað er gjørligt, eigur at verða sagt frá yvirtíðararbeiði dagin fyri.
*Stk. 4.* Tímalønin er bruttoárslønin býtt við 2080. Bruttoárslønin er grundløn + viðbøtur.
*Stk. 5.* Fyri yvirtíðararbeiði, ið fer út um 2 tímar, eiga starvsfólk rætt til ½ tíma mattíð uttan frádrátt.
*Stk. 6.* Handverkari við niðursettari arbeiðstíð fær bara yvirtíðargjald fyri álagt arbeiði aftaná vanligu arbeiðstíðina hjá viðkomandi stovni.

**§ 7. Arbeiði forskotna tíð**
Henda grein er um handverkarar, sum ikki bara arbeiða mánadag til fríggjadag, men eisini um kvøldarnar, leygardagar og sunnudagar sum lið í tí vanliga planlagda arbeiðnum.
*Stk. 2.* Handverkarin skal minst 3 vikur fram vita, nær hann hevur frí og nær hann skal til arbeiðis.
*Stk. 3.* Handverkari, sum skal arbeiða leygardag og/ella sunnudag, skal hava 1 ella 2 aðrar frídagar í staðin (forskotið vikuskifti).
*Stk. 4.* Fyri arbeiði millum kl. 17.00 og 23.00 mánadag til fríggjadag verður latið vaktargjald 1 eyka um tíman (16% av tímalønini á stigi 12). Fyri arbeiði millum 23.00 og 06.00 verður latið vaktargjald 2 eyka um tíman (dupult av vaktargjaldi 1).
*Stk. 5.* Fyri arbeiði leygardagar og sunnudagar verður latið vaktargjald 2 eyka um tíman.
*Stk. 6.* Fyri arbeiði á teimum í § 15 ásettu frídøgunum verður latið vaktargjald 2 eyka um tíman.
*Stk. 7.* Hesar reglur eru galdandi á øllum stovnum, har annað ikki er tilskilað.
*Stk. 8.* Verður neyðugt at broyta arbeiðstíðina við stuttari freist, ger arbeiðsgevarin avtalu við handverkararnar um rímiliga eyka samsýning.

**§ 7 a. Vaktarskylda**
Henda grein er um eitt nú húsavørðar. Tá ið handverkari verður settur í starv, sum fevnir um ávísa vaktarskyldu ella ávísa telefonvakt og ber í sær aðrar vansar, skal avtala verða gjørd um, hvørja samsýning, handverkarin skal hava. Samsýningin kann vera veitt sum løn ella sum avspákan. Tá ið mett verður um samsýningina, verður tikið við alt tað, sum hevur týdning, so sum, hvat verður kravt av handverkaranum, hvussu ofta nakað kemur fyri, og tradisjónirnar í fakinum.
Hevur ein handverkari skyldu at ansa flagginum, verður virðið av tí sett at vera 1.000 kr. eyka um mánaðin, goldið sum eyka samsýning ella sum avspákan. Eru fløggini 4 ella fleiri, er samsýningin 1.500 kr. eyka um mánaðin, goldið sum eyka samsýning ella sum avspákan.
Avtalur um viðbøtur verða at senda Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum til góðkenningar.
*Stk. 2.* Handverkari, sum hevur regulera tilkallivakt við øllum skyldum, fær vaktargjald.
*Stk. 3.* Fyri tilkallivakt mánadag til leygardag verður latið vaktargjald 1. Sunnumorgun klokkan 0 til sunnukvøld klokkan 24 verður latið vaktargjald 2.
*Stk. 4.* Fyri tilkallivakt á teimum í § 15 nevndu frídøgum klokkan 0 til 24 verður latið vaktargjald 2.
*Stk. 5.* Nevndu vaktargjøld verða ikki veitt saman við yvirtíðargjaldi.

**§ 8. Eftirlønargjald**
Arbeiðsgevarin rindar eftirlønargjald av grundlønini eftir lønartalvu galdandi fyri henda sáttmála í góðkenda eftirlønarskipan sambært eftirlønarlógini.

**§ 9. Fyribils tænasta í hægri starvi**
Handverkari, sum eftir serligum boðum ella eftir frammanundan fastløgdum arbeiðslagi við landsstýrisins góðkenning fyribils røkir hægri starv í meira enn 7 arbeiðsdagar samfelt, eigur í hesum tíðarskeiði at vera løntur við somu løn, sum hann hevði fingið, um hann varð settur í starvið, treytað av, at hann yvirtekur tær arbeiðsuppgávur, ið standast av hægra starvinum.

**§ 10. Avspákan**
Álagt yvirtíðararbeiði kann verða avspákað, og verður avspákingin tá longd við teimum í § 6 nevndu yvirtíðarsatsum.

**§ 11. Tænastuferðir**
Dag- og tímapeningur á tænastuferð og útiviðbót er hin sama sum fyri tænastumenn landsins.

**§ 12. Ferðing í arbeiðsørindum**
Ferðing í arbeiðsørindum til og frá ikki vanligum arbeiðsstað er at rokna sum arbeiðstíð sambært § 3 og § 7. Henda skal tó í mest møguligan mun liggja í vanligari arbeiðstíð. Ferðing millum kl. 22.00 og 08.00 verður ikki íroknað, um handverkari fær ávíst og goldið seingjapláss.
*Stk. 2.* Viðvíkjandi koyring verður víst til rundskriv Fíggjarmálaráðsins "Reglur um endurgjald fyri nýtslu av egnum bili í tænastuørindum", dagfest tann 28. mars í 2007.

**§ 13. Flytisamsýning**
Um kravt verður av handverkara, at hann flytur í annað stað at búgva, verða flutningsútreiðslur hansara av húski og húsbúnaði samsýndar honum eftir rokning.

**§ 14. Arbeiðsklæði**
Er arbeiðsbúni kravdur, rindar arbeiðsgevarin hann. Víst verður eisini til LD-rundskriv 1998-2.

**§ 15. Fastir frídagar**
Jólaaftan, nýggjársaftan, páskaaftan, flaggdagurin, hvítusunnuaftan, ½ grundlógardagurin, ½ ólavsøkuaftan, ólavsøkudagur umframt allir halgidagar eru frídagar.
*Stk. 2.* Handverkarar hava harumframt rætt til serstakar frídagar eftir avtaluni um serstaka fríviku.

**§ 16. Frítíðarreglur**
Frítíð er eftir løgtingslóg nr. 30 frá 7. apríl 1986 um frítíð við løn við seinni broytingum.
*Stk. 2.* Handverkari fær 12% í frítíðarløn av goldnari yvirtíðarløn.

**§ 17. Farloyvi v.m.**
Handverkara skal verða loyvt at fáa farloyvi uttan løn, um so er at tað ikki stríðir ímóti áhugamálum stovnsins. Um so, at handverkari fær farloyvi í samband við útbúgving, ið tænir áhugamálum stovnsins, skulu partarnir kunna koma ásamt um farloyvi við løn ella niðursettari løn. Farloyvi kann verða givið í upp til 2 ár hvørja ferð og í mesta lagi í 4 ár, og er tað skylda stovnsins, at starv er opið, tá ið viðkomandi kemur aftur.

**§ 18. Barnferð**

Handverkari, ið er við barn, eigur at siga stovninum frá í minsta lagi 3 mánaðir, áðrenn hon væntar at eiga.

Handverkari, ið vegna viðgongu og barnsburð er burtur frá arbeiði, hevur rætt til barsilsfarloyvi við løn í 24 vikur tilsamans, at rokna frá í fyrsta lagi 8 vikur undan væntaðum barnsburði.

Frá 14. viku eftir barnsburð kunnu foreldrini býta rættin til barsilsfarloyvi við løn ímillum sín.

Umframt nevndu sømdir kann handverkari fáa farloyvi við løn alla viðgongutíðina, tá ið hon við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum.

*Ættleiðing*

Handverkarar, ið ættleiða barn, hava rætt til fráveru við løn í upp í 4 vikur áðrenn tey fáa barnið og í 24 vikur tilsamans.

Foreldrini kunnu býta rættin til fráveru við løn ímillum sín.

Rætturin til barsilsfarloyvi við løn er treytaður av, at ættleiðingarmyndugleikin frammanundan hevur gjørt av, at foreldrini, annað ella bæði, skulu vera heima í sambandi við, at tey fáa barnið.

*Farloyvi við ongari løn*

Herumframt hava handverkarar rætt til farloyvi við ongari løn og uttan at missa starvsaldur, soleiðis at skeiðini tilsamans eru upp í 52 vikur eftir føðing.

**§ 19. Reglur fyri uppsøgn, sjúkraløn v.m.**

Viðvíkjandi uppsagnarfreist, løn undir sjúkralegu, eftirsitiløn v.m. verða reglurnar í løgtingslóg um starvsmenn at galda, tó soleiðis, at eftirsitiløn verður goldin í mun til uppsagnartíðina hjá viðkomandi handverkara, t.e. minst 3 mánaðir og í mesta lagi 6 mánaðir. Er handverkari valdur sum álitisfólk, verður uppsagnarfreistin longd við 3 mánaðum.

*Stk. 2.* Handverkari kann fáa frí við løn, tá ið barn hansara er sjúkt, tó hægst 2 dagar hvørja ferð og í mesta lagi 10 dagar árliga. Hevur handverkari meira enn 2 børn undir 10 ár, kann hann fáa frí í upp til 20 dagar.

**§ 20. Álitisfólk**

Tá ið tað á einari deild starvast í minsta lagi 5 limir í Handverkarafeløgunum, hava hesir limir rætt at velja eitt álitisfólk. Álitisfólk og nevndarlimir kunnu ikki verða uppsøgd, uttan at uppsøgnin hevur verið til viðgerðar millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Handverkarafelag/ Landsfelag Handverkaranna.

*Stk. 2.* Til álitisfólk kann bara veljast tann, ið hevur fulltíðarstarv og hevur arbeitt á deildini í minsta lagi í 1 ár, uttan so at tað av serligum umstøðum gerst neyðugt at víkja frá hesum.

*Stk. 3.* Lærlingar kunnu ikki veljast til álitisfólk.

*Stk.4.* Valið hevur ikki gildi, fyrr enn handverkarafeløgini hava góðkent tað og boðað leiðsluni á avvarðandi stovni frá. Henda fráboðan eigur at verða gjørd í seinasta lagi 14 dagar eftir valið.

*Stk. 5.* Álitisfólkið hevur skyldu at ansa eftir, at lógir, sáttmálar, fyriskipanir o.a., ið eru galdandi fyri arbeiðsplássið sum heild, verða yvirhildin, og skal virka fyri best møguligum samarbeiði limanna og leiðslunnar millum.

*Stk. 6.* Álitisfólkið hevur rætt og skyldu til at tingast við deildar- og stovnsleiðsluna um øll mál, sum hava týdning fyri starvsfólkið og stovnin. Er álitisfólkið ikki nøgt við avgerð leiðslunnar, kann tað leggja málið fyri felagið.

*Stk. 7.* Álitisfólkið skal í samráð við stovnin í arbeiðstíðini hava møguleika fyri at taka sær av málum, ið viðvíkja starvsfeløgunum ella arbeiðsviðurskiftunum á staðnum, tó soleiðis, at tað stendst so lítið tarn av hesum sum møguligt.

Umframt nevndu sømdir kann handverkari fáa farloyvi við løn alla viðgongutíðina, tá ið hon við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum.

*Ættleiðing*

Handverkarar, ið ættleiða barn, hava rætt til fráveru við løn í upp í 4 vikur áðrenn tey fáa barnið og í 24 vikur tilsamans.

Foreldrini kunnu býta rættin til fráveru við løn ímillum sín.

Rætturin til barsilsfarloyvi við løn er treytaður av, at ættleiðingarmyndugleikin frammanundan hevur gjørt av, at foreldrini, annað ella bæði, skulu vera heima í sambandi við, at tey fáa barnið.

*Farloyvi við ongari løn*

Herumframt hava handverkarar rætt til farloyvi við ongari løn og uttan at missa starvsaldur, soleiðis at skeiðini tilsamans eru upp í 52 vikur eftir føðing.

**Tímalønarsáttmáli**

Í sáttmálaskeiðnum verður arbeitt við at gera ein tímalønarsáttmála. Tað áliggur Landsverki at seta gongd á tað arbeiðið.

Sáttmálin er dagførdur og lønartalvurnar eru dagførdar sambært omanfyristandandi.

*Á Argjum tann 16. desember í 2015*

*Føroya Handverkarafelag*

*Fíggjarmálaráðið*

*Landsfelag Handverkaranna*